## Ritan á sleipistøð



Ferðamannaskipið Ritan fer týsdagin 28. august á sleipistøð í Vági. Roknað verður við, at arbeiðið fer at taka 14 dagar. Avloysaraskipið hjá Rituni verður Silja, sum fer at sigla eftir galdandi ferðaætlan. Farmatúranir verða røktir av Dragaberg, sum tó ikki byrjar siglingina fyrr enn fríggjadagin. Skúvoyartúranir hjá Rituni verða eisini røktir av Dragaberg.

## Nátasjúka er framvegis í Føroyum

Um fáar dager er besta nátatíð, og sambært Landslæknanum er nátasjúka framvegis í Føroyum. Frá 1954 til 2003 vóru 48 tilburðir av havhestasjúku skrásettir. Í 1999 vóru 431 nátar í Føroyum kannaðir fyri havhestasjúku. Kanningin vísti, at 10 prosent av havhestaungunum vóru smittaðir. Landslæknin sigur, at tað er umráðandi at tey, ið taka náta, vaska sær væl um hendurnar við kloraminvatni undir og aftaná veiðuna. Eisini áðrenn etið verður, ella um ein festir sær í. Harafturat skulu bæði oljuklæði og klæðini innanundir vaskast væl, tá ið veiðan er av. Kloramintablettir og leiðbeining fáast á apotekinum.

# Ókeypis at offra sandoyingar

**- Sambandsflokkurin hevur kastað seg yvir Sandoynna fyri at vinna nakrar bíligar atkvøður í Havn. Tað einasta rætta er at Løgmaður útskrivar nýval beinanegin fyri at reinsa luftina, heldur partamaður hansara, John Johannessen**

POLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Tað er heilt órímiligt at gera Sandoyartunnilin til tað stóra dýrið í føroyska búskapinum.

Tað heldur John Johannessen, løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin.

Hann sipar til kravið frá Sambandsflokkinum um at útseta Sandoyartunnilin til 2010.

Men hann heldur, at tað er mest av taktiskum orsøkum, at Sambandsflokkurin velur sær akkurát Sandoyartunnilin sum ta verkætlanina, ið skal útsetast.

- Tað er so lætt hjá sambandsflokkinum at offra Sandoyartunnilin, tí netupp í Sandoy hevur sambandsflokkurin leingi verið veikur og hevur onki umboð á Løgtingi. Sostatt er mín niðurstøða, at Sambandsflokkurin bara offrar sandoyingar fyri at vinna sær nakrar bíligar atkvøður í Havn.

Men John Johannessen heldur ikki, at tað er nøkur orsøk at pilka akkurát Sandoyartunnilin burturúr øllum og gera hann til syndabukk.

- Hví nevnir kemur Sambandsflokkurin samstundis við nýggjum uppskoti um at byggja trygdarmiðstøð í Klaksvík fyri hálvthundað milliónir, ella Skálafjarðartunnilin fyri fyri eina slaka milliard?, spyrtingmaðurin hjá Javnaðarflokkinum.

- Hví heitir landsstýrismaðurin ikki á bankakervið um at halda aftur við at stimbra upp undir ovurnýts luna? Landsstýrismaðurin hevur nógvar møguleikar, men hann hevur einans valt at leggja seg eftir Sandoyartunlinum, tí tað skalar ikki sambandsflokkin, men tryggjar Laksafoss eitt gott val í Havn, sigur John Johannessen og staðfestir, at ein politikari eigur at arbeiða fyri alt samfelagið og ikki bert fyri góðum veljarakanningum í Havn.



*John Johannessen heldur, at sambandsflokkurin miðvíst offrar sandoyingar fyri at fáa nakrar atkvøður í Havn. Hann heldur, at tað er neyðugt við nývali fyri at reinsa luftina*

### Mugu síggjast í eini heild

Hann heldur, wwat tað er neyðugt at síggja allar útbyggingarnar í eini heild. Hann nevnir, at Skálafjarðartunnilin er ein spurningur um at stytta eina farleið eitt sindur. Sandoyartunnilin er ein spurningur um at knýta alt Suðurøkið tættari at miðstaðarøkinum. Samstundis fer Sandoyartunnilin at gera miðstaðarøkinum ótaldar møguleikar fyri at útvega ungum húskjum byggilendi 10-15 minuttir burtur frá Havnini, tí sum støðan er nú, er tað við at verða ógjørligt hjá vanligum fólki at seta búgv i høvuðsstaðnum.

- Sandoyartunnilin skal eisini síggjast í tí ljósinum, hóast hann á pappírinum bara er til undirskot fyri samfelagið.

Annars undrar tað framvegis John Johannessen, at samgongan uttan himpr er til reiðar at lata ein tunnil, sum gevur avlop, upp í hendurnar á privatum at skúma róman av, samstundis sum at landið skal hanga upp á teir tunlar, sum geva hall og lata skattgjaldarin bløða fyri tað.

- Men tað sær út til, at samgongan kastar alla ábyrgd frá sær fyri tað upphiting, sum Skálafjarðartunnilin førir til, men vil heldur offra Sandoyartunnilin.

Hinvegin staðfestir John Johannessen eisini, at skulu sparingar gerast, kemur tað undir ongum umstøðum upp á tal at spara í rakstrinum, so at skúlaverkið, heilsuverkið og almannaverkið vera rakt.

### Val beinanvegin

John Johannessen hevur fyrr boðað frá, at eftir hansara tykki eigur Løgmaður at útskriva val í heyst fyri at reinsa luftina

Og tað heldur hann framvegis.

Samgongan eigur at avgreiða málið um bústaðarpakkan, eftirlønarskipanina og brúkalóggávuna.

- Men eg haldi, at løgmaður eigur at útskriva val, áðrenn fyri at reinsa luftina og so at eitt nýtt løgting kann gera fíggjarlógina fyri næsta ár.

- Ein fíggjarlóg hjá hesi samgonguni verður tað bera valagn, sigur John Johannessen.

# Samgongulimur gongur ímóti sínum egnu



*- Hetta er fyrstu ferð í hundrað ár, at vit sleppa at atkvøða um eitt valdømi, sigur Poul Mikkelsen, sum alla tíðina hevur verið eldhugaður forsprákari fyri einum valdømi*

**Poul Mikkelsen ætlar sær ikki at virða avtaluna hjá floksformonnunum um at bíða við einum valdømi.**
**- Koyrir Edmund Joensen uppskotið ígjøgnum, so atkvøði eg fyri, sigur hann**

POLITIKKUR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Poul Mikkelsen úr Fólkaflokkinum leggur líka í avtaluna hjá floksformonnunum í samgonguni, har teir samdust um at útseta spurningin um eitt valdømi til eftir løgtingsvalið.

Um Edmund Joensen heldur fast við uppskotið, ætlar Poul Mikkelsen avgjørt at atkvøða fyri tí, hóast tað hósdagin ljóðaði, at samgongan er samd um at bíða við spurninginum.

Poul Mikkelsen, sum er í Grønlandi saman við Útnorðurráðnum, sigur, at Jørgen Niclassen, formaður í Fólkaflokkinum, ringdi seg upp, og greiddi frá um ætlanirnar hjá formonnunum. Men hann ætlar sær kortini ikki at lúta, og fer kortini at atkvøða fyri.

- Nú er málið komið so langt, og hetta er fyrstu ferð í hundrað ár, at vit sleppa at atkvøða um eitt valdømi, sigur Poul Mikkelsen, sum alla tíðina hevur verið eldhugaður forsprákari fyri einum valdømi. Hann heldur, at tingfólk kunnu ikki blíva við at kjakast og útseta spurningin.

- Hetta er eitt somikið tiltrongt mál, at nú skal avgerðin takast. Vit hava tørv á einum nýggjum slagi av politikki her á landi. Tað kann ikki vera meiningin, at vit skulu sita og diskutera prísin á ferðaseðlunum við Ternuni. Lat okkum fáa eitt ting, sum førir heildarpolitikk. Lokalpolitikkin skulu vit lata kommunurnar um, sigur Poul Mikkelsen.